## KÍ-vitjan í Orknoyggjum 1958

Í farnu viku høvdu vit eina mynd av einum manning, hvørs uppruni ivi var um: Var talan um eina skipsmanning ella var talan um eitt fótbóltslið hjá KÍ á ferð í Orknoyggjum.

Sama dag fingu vit uppspurt, at talan í veruleikanum var um eitt fótbóltslið.

Teir vóru á vitjan á Orknoyggjum í 1958, og vóru farnir leiðina suður í hav við bátinum »Ørvur«, sum Kjølbro í Klaksvík átti.

Eigarin av myndini hevur nú sent okkum øll nøvnini á myndini, og verða tey prentað her:

Aftast vinstrumegin:

1) Herman Dahl, 2) Ludvík Jónsson (Luddi hjá Toda), 3) Kristoffur í Vági, 4) Jens Hansen 5) enskur, 6) enskur, 7) Steinbjørn Jacobsen, 8) Jógvan Jacobsen, 9) Gutti Kallsberg, 10) Jógvan á Høvdanum, 11) Frímann Baldvinsson, 12) Zacharias Lydersen, 13) Sámal Júst Ziska Dahl, 14) enskur og 15) Álvur Klakk.

Sitandi eru teir vm.:

1) Borgarstjórin á plássinum, 2) John Reid Bjartalíð, 3) Poul Jacob Olsen, ið var skipari á Ørvi henda túrin, og Robert Joensen.

**sb.**



Fyri 35 árum síðan:

## Skipsføraraprógv í apríl 1970

**Í apríl 1970 fingu hesir skipsførarar og stýrimenn prógv á Føroya Sjómansskúla**



*Fremra rað f.v.: Herman Olsen, Rituvík, skipsførari, Torleivur Mikkelsen, Vestmanna, skipsførari, Ørvur Thomassen, Klaksvík, skipsførari, og Pauli Larsen, Þorkeri, skipsførari*

*Aftara rað f.v.: Mortan Johannesen, Tórshavn, stýrimaður, Regin Nónstein, Hvalba, skipsførari, Edvin Vestergaard, Vágur, skipsførari, Alvin Joensen, Vágur, stýrimaður, Asbjørn Heinesen, Klaksvík, skipsførari, Heini Vesturdal, Eiði, skipsførari, Jógvan Klakkstein, Klaksvík, skipsførari, Johan Christiansen, Tórshavn, skipsførari, og Páll Heinesen, Sørvágur, stýrimaður*

*Kelda: Myndaárbókin- árið ið fór 1970*

Lesið Sosialin - so eru tit við




MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýføddu barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin